Fleiri rásir - einki roks

Á Kanal 5 sunnukvøldið kl. 22.25

# Te við Mussolini



Tann innbilska, ovurstolta Arabella (Judi Dench) drekkur te saman við Mussolini

Ein flokkur av enskum og amerikonskum kvinnum halda summarferiu í sólríka Italia, í Firense í 1935. Men frítíðin verður longri enn væntað, tí fasistarnir taka valdið í landinum. Einræðisharrin Mussolini er ein máttmikil maður, hetta kemst av, at hann fingið tokini at koyra rættstundis. Lítli Luca er sera syrgin, tí mamman er deyð, og pápin hevur ikki stundir at taka sær rættiliga av honum. Men lukkutíð, so er Luca altíð vælkomin innar hjá Mary. Hon er ein eldri rík kvinna úr Onglandi, ið er komin til Italia fyri at njóta tað ríka mentanarlívið. Mary og vinkonur hennara njóta allar ta livandi mentanina í Italia - tann fína Lady Hester, innbilska Arabella, amerikanski listasavnarin Elsa og so tann samkynda og altíð fegna Georgie. Vinkonurnar fylgja allar við í tí, sum fer fram á italienska mentanarpallinum. Teirra fyrsta tiltak, eftir at fasistarnir taka valdið, er at bjóða Mussolini fram við til ein temunn. Tær tilrættisleggja hesa hugnaløtuna við einaræðisráðharranum í eini roynd at verja mentanarlívið og høviskan atburð í tí almenna. Men pápi lítla Luca gerst bangin fyri hesum tiltøkunum hjá kvinnunum, so hann sendir Luca til Eysturríkis á skúla fyri at hann skal sleppa undan teirra ringu ávirkan. Men eftir kríggið henda broytingar í lívunum hjá kvinnunum.



Cher er við í romantiska spenningsfilminum frá 1999, hon er í leiklutinum sum listasavnarin Elsa

# DR Dokumentar: »Bara ein týskari«

Á DR2 týskvøldið kl. 22.00



Dorothea Gunther er fyri fyrstu ferð, aftaná 57 ár, á grøvini hjá yngru systir síni, Margit, ið einans eitt ára gomul doyði í eini flóttafólkalegu í Keypmannahavn í 1945



Eftir fimm ár av týskari herseting og kríggi ímóti einum nasistiskum yvirgangsveldi, var hatrið ímóti øllum týskum ógvusligt, eisini eftir kríggið

Margit Springer var ein lítil myrkhærd smágenta úr eystara parti av Týsklandi. Men hon bleiv einans eitt ára gomul. Margit var eitt av túsundum av børnum, ið doyðu undir sera ringum umstøðum í Danmark í árunum eftir kríggið. Hesi børnini komu í flóttafólkastreyminum, sum tók seg upp sum kríggið leið. Tá týska hersetingin av Danmark varð enda, vóru umleið 240.000 týskir borgarar flýddir úr teimum heilt eystaru pørtunum av Týsklandi og yvir um Eystursjógvin. Tey flestu av hesum flóttafólkunum vóru kvinnur, børn og eldri. Hesi flýddu undan bumbingum, flogálopum, hungri og kulda. Ferð teirra var long og stríggin, og nøkur doyðu á leiðini. Men fram til Keypmannahavnar náddu fleiri kortini. Nú hildu tey, at líðingarnar tóku ein enda. Men donsku myndugleikarnir settu hesi mongu flóttafólkini í legur - handan píkatráð vórðu tey innigird og vápnaðir vaktarmenn hildu eyga við teimum. Bæði heilsuviðurskifti og reinføri vóru út av lagi vánalig í fleiri av legunum. Umfarssóttir gingu og matur var lítið av, ella var hann spiltur. Títtleikin av barnadeyða tað fyrsta árið í eini legu var ovurstóru, heili átta av tíggju doyðu. Navnið hjá Margit stendur á einum steinkrossi í einum horni í Vestre Kirkegård í Keypmannahavn. Hennara navn er eitt av fleiri hundrað øðrum nøvnum. Lagna hennara, og somuleiðis fleiri túsund øðrum týskum flóttafólkum, er ein døkkur kapittul í danmarkarsøguni, ið næstan ikki hevur sæð dagsins ljós. Hendan avdúkandi sendingin ger brúk av donskum og týskum vitnisfrásøgnum og gomlum skjølum úr Ríkisskjalasavninum. Somuleiðis fylgir sjónvarpsliðið eldru systir Margit, ið gjørdi av, eftir 57 ár, at ferðast aftur til Danmarkar at vitja gravstaðin hjá systrini í Keypmannahavn.

***Tema-sendingarnar, undir heitinum "Við týskum eygum", ið snúgva seg um 2. veraldarbardaga, eru hesa vikuna:***

Sunnudag 24. kl. 19.00 - Flødeskumsfronten 2:3
Mánadag 25. kl. 18.40 - Blikktrumman
Mánadag 25. kl. 22.00 - Hitler í egnum orðum 2:2
Týsdag 26. kl. 22.00 - Bara ein týskari
Mikudag 27. kl. 19.50 - Fyri føraran, fólkið og fedralandið